# Sniðgev tín egna skógv

- Renniskógvar
- Fótbóltskógvar
- Vel tín lit og navn



mi adidas

7. - 11. juni
bílegg tíð

P/F THOMAS DAM
ÍTRÓTTUR · N. Finsensgøta 5
Postsmoga 268 · 110 Tórshavn · Tel 35 53 00

Sosialurin 341800





Á Almannastovuni virka vit miðvíst fyri at lúka krøvini frá politiska myndugleikanum og viðskiftafólkunum. Dentur verður lagdur á høgt tænastustøði, rættartrygdina og virðingina fyri einstaklinginum, eins og virkað verður fyri áhaldandi at menna førleikan, trivnaðin og samstarvið á stovninum.

Almannastovan er í støðugari menning og skal næsta hálva árið fremja eina stóra verkætlan. Henda verkætlan krevur nógva orku av starvsfólkunum á stovninum, og tí søkir Almannastovan avloysarar í tíðaravmarkað størv fyri tey starvsfólk, ið verða við í arbeiðnum við verkætlanini.

KREA.FO · TEL 44 93 39

## Almannastovan søkir avloysarar.

Tey, ið vera sett, koma at avloysa starvsfólk á Almannastovuni, sum skulu luttaka í eini verkætlan. Eisini kann talan verða um at avloysarnir fáa uppgávur viðvíkjandi sjálvari verkætlanini. Avloysarastørvini verða sett skjótast gjørligt og enda 31. desember 2005. Uppgávurnar eru fjølbroyttar og kunnu koma at fevna um sosialráðgevara-, málsviðgerara- og skrivarauppgávur, arbeiði innan KT og annað fyrifallandi arbeiði.

Almannastovan kann bjóða tær eitt avbjóðandi avloysarastarv, ið gevur tær royndir, ið tú kanst brúka í framtíðini.

**Avloysari til ymsar deildir**

Vit sóknast eftir fólki, ið hevur sosialráðgevaraútbúgving, skrivstovuútbúgving ella aðra útbúgving. Okkara ynski er at tú hevur kunnleika til almenna fyrisiting, góð evni at orða teg skrivliga á føroyskum, góð samstarvsevni, dámar væl avbjóðingar og ert ágrýtin.

**Avloysari til KT-deildina**

Vit sóknast eftir fólki, ið hevur viðkomandi útbúgving innan KT ella drúgvar royndir innan KT.

Okkara ynski er at tú hevur vitan um og innlit í KT-trygd, hevur skil fyri kravfestingum og góð evni at orða teg skrivliga.

Fyri avloysarastørvini er galdandi at lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmálan millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra, á tel. 353510

Skrivlig umsókn skal vera Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 20. juni 2005 kl. 12.

Send umsóknina til:
Almannastovuna,
Smyrilsvegur 20,
Postboks 3096,
110 Tórshavn.

almannastovan

almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo